# Til sølu



## Hús á Skála

Grundøki: 570 $m^2$
Húsini: 123 $m^2$
Hædd: 1
Byggiár: 1980 – *innrættað sum skrivstovubygningur*



## Virkisbygningur í Oyndarfirði

Byggiár: 1997
Grundøki: Leigugrundøki
Bygningur: 647 $m^2$
+ sjálvstøðugur smiðjubygningur 75 $m^2$
*1. hædd:* arbeiðshøll, kantina, umklæðingarrúm, toilet v.m.
*Útbygningur:* frystitunnil og maskinrúm
*2. hædd:* skrivstova

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Runavíkar Kommunu.

Runavíkar Kommuna
Heiðavegur 26
600 Saltangará
Tel. 417000 · Fax 417001

# Lærugreinaráðgevi í føroyskum

## fyri vinnu-, miðnáms og hægri útbúgvingar

**Starvið**
Í Landsmiðstøðini er eitt starv sum lærugreinaráðgevi í føroyskum fyri vinnu-, miðnáms- og hægri útbúgvingar leyst at søkja til setanar frá 1. januar 2006.

Talan er um eitt fjølbroytt og áhugavert starv, har lærugreinaráðgevin í samstarvi við avarandi partar m.a. skal:
- virka fyri fagligari og námsligari menning í lærugreinini føroyskt
- ráðgeva viðvíkjandi undirvísingarmiðlum og arbeiðshættum í lærugreinini
- ráðgeva og vegleiða í fakligum spurningum og fremja fakligar eftirmetingar
- hava leiðsluna av skrivligu uppgávunevndunum í føroyskum á vinnu- og miðnámsskúlunum
- vera Próvstovuni til hjálpar í ymiskum høpi
- luttaka í verkætlanum, serliga á tí námsfrøðiliga økinum og innan KT

Lærugreinaráðgevin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdirnar eru í samsvari við nútímans krøv.

Ráðgevin skal, umframt omanfyri nevndu uppgávur, eisini vera til reiðar at átaka sær aðrar uppgávur í Landsmiðstøðini

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjari hevur
- kandidatprógv frá universiteti við prógvi í føroyskum
- verkliga og ástøðiliga námsfrøðiliga útbúgving
- undirvísingarroyndir á miðnámsstigi
- áhuga fyri námsfrøðiligum arbeiði og fyri nýtslu av KT í undirvísingarhøpi
- góð samstarvsevni og hug at arbeiða í bólkum
- førleika at menna samstarvið við starvsfelagar, stovnar, lærarar og áhugafelagsskapir
- vera ein virkin partur av toymisumhvørvinum í Landsmiðstøðini og samstundis kunna arbeiða sjálvstøðugt
- áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir

**Vit bjóða**
- eitt spennandi starv við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir
- arbeiði á einum høgum fakligum stigi og góðar møguleikar fyri bæði persónligari og fakligari menning

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanartíðin fyri lærugreinaráðgevan er í fyrstu atløgu 3 ár. Síðani kann setanartíðin verða longd tvær ferðir við tveimum árum hvørja ferð. Um serlig viðurskifti tala fyri hesum, kann setanartíðin longjast út yvir 7 ár.

Arbeiðstíðin í ráðgevastarvinum er 2/3 av fullari arbeiðstíð. Tann, ið settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í einum vinnu- ella miðnámsskúla, tó í mesta lagi svarandi til 1/3 starv.

**Umsókn**
Umsóknir við prógvum, c.v. o.ø. skulu verða Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegur 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mikudagin 23. november 2005.

Gjøllari upplýsingar fáast frá Petur Simonsen, stjóra á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

*GG! Starvið er treytað av játtan á Løgtingsins Fíggjarlóg.*

LMS Landsmiðstøðin

***Landsmiðstøðin** er tænastustovnur í undirvísingarverkinum, sum m.a. sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við Mentamálaráðnum eina lærugreinaráðgevaskipan og skipar fyri skeiðum við fakligum og námsligum innihaldi.*




www. Sosialurin .fo

# Auto 311234

*- altíð til tænastu*
*Dag og nátt – alt árið*




**Latið okkum koyra teg til og frá**

**- ella koyra ørindi fyri teg**

**Vit hava hýruvognar sum taka upp til 8 ferðandi**

- **Bensin**
- **Diesel**
- **Kiosk**
- **Talutíðarkort**
  - **Kall**
  - **Føroya Tele**

**Auto 311234**